

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 02 - 2012

# Tangaskip fingu ikki ein dropa av olju

Tangaskip, sum vóru komin til Iran eftir olju til eitt oljureinsiverk í Grikkalandi, noyddust avstaðaftur uttan at hava fingið ein einasta dropa í tangarnar. Tað skrivar tann hálvalmenna iranska tíðindastovan Fars. Tíðindastovan skrivar, at skipini vóru komin eftir 500.000 tunnum av olju til reinsiverkið í Grikkalandi, men at teir iransku myndugleikarnir sýttu fyri at lata tey fáa nakra olju. Faes upplýsir onga keldu, men sigur, at iransku myndugleikarnir tóku avgerðina, tí at ES hevur sett fleiri tiltøk í verk ímóti landinum. ES-londini samtyktu í januar at steðga øllum oljuinnflutningi úr Iran, tí iranska stýrið sýtti fyri at samstarva um landsins kjarnorkuverkætlan. Iranski oljumálaráðharrin segði herfyri, at Iran fór at steðga øllum oljuhandli við nøkur evropeisk lond, og í síðstu viku gavst landið at selja bretskum og fronskum feløgum olju. ES-nevndin hevur sagt, at eitt iranskt sølubann fær ikki stórvegis ávirkan á samveldið, tí tað er nóg mikið av olju á goymslu í Evropa.